Eysturoyarsiglingin aftur ígongd

Mánamorgunin klokkan tíggju minuttir í sjey, tekur Ternan I uppaftur siglingina millum Skálafjør›in og Havnina. – Nú hava vit eitt skip tókt og so mugu ganga lógini um Eysturoyarsiglingina á møti, sigur Heri Joensen, flutningslei›ari á Strandfer›sluni

Siglingin millum Skálafjør›in og Havnina ver›ur nú tikin uppaftur

SVEINUR TRÓNDARSON

Eysturoyarsiglingin, sum hevur ligi› lamin í longri tí›, ver›ur tikin upp aftur mánamorgunin. Klokkan tíggju minuttir í sjey mánamorgunin fer Ternan I av Strondum vi› kós móti Toftum og sí›ani móti havnini.

Túrurin hjá Ternuni I mánadagin er ein beinlei›is avlei›ing av lógini um Eysturoyarsiglingini, sum Løgtingi› samtykti fyri einum ári sí›ani ella so, og ta› hóast ta› fíggjarliga als ikki er samsvar millum inntøkur og útrei›slur.

Ganga lógini á møti

Heri Joensen, flutningslei›ari á Strandfer›sluni, sigur vi› Sosialin, at teir hava gjørt nakrar umvælingar umbor› á Ternuni I, og at hon nú er klár at seta í sigling

– Ta› er eingin vegur uttanum. Nú veturin er av og Ternan I ikki longur siglir um Vestmannasund, hava vit eitt skip tókt, og ta› merkir, at so mugu vit ganga lógini á møti, hvat vi›víkur Eysturoyarsiglingini, sigur hann.

Heri grei›ir frá, at ljósmotorurin á Ternuni I er umvældur umframt at onkrar a›rar umvælingar eru gjørdar, og at hon nú er klár at seta í sigling.

Eingin sigling hevur annars veri› millum Skálafjør›in og Havnina sí›ani Pride var› lagdur eftir at hann fekk eitt maskinbrek, sum seinni vísti seg at vera so álvarsligt, at ta› var ov d‡rt at gera aftur.

– Tá vóru øll skipini hjá okkum í drift a›rasta›ni og tá bar heilt einfalt ikki til hjá okkum at seta skip inn í hesa siglingina. Nú er tann trupulleikin burtur og tí letur ta› seg gera, sigur Heri.

Eykajáttanin í lagi

Tá Skálafjar›asiglingin var› lógarfest, var ta› bara tann praktiski spurningurin, sum var› loystur. Tann fíggjarligi parturin lá eftir og ta› hev›i vi› sær, at pengingur vanta›i í kassanum hjá Strandfer›sluni fyri hetta ári›.

Løgtingi› var heldur enn ikki afturhaldi› vi› at lata stovninum eykajáttan solei›is at endarnir rukku saman, men stutt á›renn summarfrítí›ina kom tann parturin upp á pláss. Strandfer›slan fekk eina eykajáttan, sum bæ›i gjørdi ta› møguligt at fáa skipini umvæld og at halda Skálafjar›asiglingina gangandi.

Tí ta› krevur nevniliga sítt.

– Løgtingi› veitti stovninum eykajáttanina, so fíggjarligi parturin av Skálafjar›arsiglingini er í lagi nú, sigur Heri, sum kortini vi›gongur, at ta› búskaparliga er ein vána handil, sum teir nú fara undir.

Snar (beinlei›is busslei›in á morgni, bl›m.) sum nú ver›ur ni›urlagdur, bar seg fíggjarliga, men ta› ger henda rutan als ikki.

Seks túsund krónur um dagin

Ver›ur roknistykki sett upp, so átti ta› at fingi› allar tingmenn – og ikki bara teir, sum løgdu uppskoti› fram – at avtiki› siglingina, alt fyri eitt.

– Brúka vit tølini frá 1997, so høvdu vit tá 450 túsund krónur í inntøkum, men vit høvdu umlei› 3,3 milliónir í útrei›slum. Leysliga rokna› svarar hetta til knappar 2 túsund krónur í inntøkum um dagin og umlei› 8 túsund krónur í útrei›slum. Eitt hall upp á gó›ar seks túsund krónur um dagin, grei›ir Heri Joensen frá.

Hvussu nógv kostar Snar?

– Hann kostar ikki Strandfer›sluni eina krónu. Farlei›in fyrst á morgni, sum var› sett upp tá sjólei›in var› avtikin, hvílir í sær sjálvum, og orsøkin til ta› er, at undirtøkan var betri enn vænta›.

Hvussu nógv fólk fer›ast vi› Snar?

– Snar er fullsettur so at siga hvønn morgun. Ta› vil siga um 40 fer›andi.

Hvussu nógv teirra metir tú fara vi› Ternuni I?

– Hyggja vit at tølunum frá tí at Pride sigldi, so vera um 25 fer›afólk um dagin, sigur Heri Joensen.

Hetta svarar til, um øll hava móna›arkort, at inntøkan ver›ur um 300 krónur um dagin. Sjálvandi legst okkurt afturat, bæ›i vi› fer›afólki og farmi, men ta› kemur ikki upp á tal, at farlei›in kemur at bera seg fíggjarliga.

Hvat so vi› hinum fimtan til tjúgu fer›afólkunum?

– Tey finna sær a›rar vegir. Onkur fer vi› bili ísta›in, me›an onnur taka ein annan buss, sum kemur til Havnar um somu tí›, men sum fer fyrr úr Eysturoynni, sigur Heri Joensen.

Kanna a›rar møguleikar

Hóast ta› í flestu oyrum tí ljó›ar heilt vitleyst, at fara undir sigling millum Skálafjør›in og Havnina, serliga av fíggjarligum ávum, so kannar Strandfer›slan møguleikarnar fyri at fáa eitt anna› skip. Eitt skip, sum er meira tí›arhóskandi og sum kann geva fleiri inntøkur.

Heri Joensen nevnir tvíkyljurnar, sum m. a. hava veri› uppi og vent í tinginum, og sigur, at ta› kanska er ein møguleiki.

– Men ein slík ver›ur uttan iva d‡r at útvega, og ta› skal sjálvandi eisini roknast vi› inn í kostna›in. Men ver›ur ein tvíkylja fingin hendavegin, so skal hon kunna taka bilar og farm, annars er hon ikki áhugaverd.

Men er ta› ikki nokkso óhugsandi at fer›afólk fara at taka bilin vi› til Havnar vi› skipi›, tá tey koma skjótari til Havnar eftir oyggj?

– Ta› er júst ta›. Vansin vi› sjóvegis sambandinum er, at tú kemur inn á Bursatanga. Bussurin koyrir ígjøgnum alla Havnina og ta› vil siga, at fer›afólki› so at siga er koyrt til dyrnar. Tí er ta› ikki hugsandi, at fer›afólk fara at brúka henda møguleikan vi› báti – og bili – til Havnar, í nóg stóran mun, at ta› ver›ur fíggjarligur samanhangur, sigur Heri Joensen at enda.

Alment er ta› tó, at sjóvegis farlei›in millum Skálafjør›in og høvu›sta›in ver›ur tikin uppaftur mánadagin 10. juli klokkan 06.50 av Strondum. Sigldir ver›a f‡ra túrar um dagin og manningin telur f‡ra mans. Ein teirra er Sámal Petur í Grund, tingma›ur. Hann ver›ur st‡rima›ur.

Sofus – á egnum veingjum

Sofus Poulsen, listama›ur, lat í gjár upp listaframs‡ning í Smi›juni í Lítluvík. Talan er um ø›rvísi s‡ning, har hann br‡tur úr n‡ggjum. Prísirnar kann ásko›arin tosa vi› listamannin um

DAGFINN OLSEN

Sofus Poulsen er virkin listama›ur. Hann lat í gjár upp listaframs‡ning í Smi›juni í Lítlivík.

Hann nevnir s‡ningina Á egnum veingjum. Hann hevur nevniliga broti› burtur úr n‡ggjum.

– Fyrr havi eg meira gjørt ta›, i› hevur veri› uppi í tí›ini, ta›, i› hevur veri› loyvt. Nú ver›ur meira bygt á egnar royndir, sigur Sofus.

– Einasta lei› frameftir, er at bróta burturúr n‡ggjum. Sum Pætur, i› leyp á bláman og upplivdi undri›, huglei›ir Sofus.

Hann hevur sum tema í málningunum landi› – Føroyar, og talan er um meira sansaligar upplivingar. Myndirnar eru stórar og eru allar gjørdar í ár. 18 myndir eru vi› og eru tær olja, akryl og vatnlitir.

Framss‡ningin Á egnum veingjum hjá Sofusi Poulsen lat upp í gjár og er opin til 12. juli. Opi› er frá kl. 16-20 og leygardag frá 12-18.

Naka› anna›, sum eisini er ø›rvísi vi› s‡ningini er, at eingin príslisti er.

– Ásko›arin skal ikki bara ganga og síggja pening fyri sær. Prísin kunnu eg og ásko›arin tosa um, sigur Sofus Poulsen, sum bjó›ar øllum vælkomnum á árligu juli frams‡ning sína í Smi›juni í Lítluvík.

Sofus Poulsen listama›ur frams‡ning í Smi›juni í Lítluvík

Mynd: Jens Kr. Vang

Pappírini skulu haldast vi› líka

Mánadagin fer Sámal Petur í Grund, tingma›ur, í n‡tt starv. Hann skal vera st‡rima›ur umbor› á Ternuni I, sum fer í sigling millum Havnina og Skálafjør›in

– Jú, ta› er so, sigur Sámal Petur í Grund. Strandfer›slan søkti í blø›unum eftir fólki til Ternuna I, men eg tímdi ikki at søkja tá. Naka› seinni hoyrdi eg so l‡singina aftur í Útvarpinum. Tá søkti eg og eg fekk ta›, grei›ir tingma›urin frá.

Sámal Petur í Grund heldur orsøkina til vantandi umsóknirnar vera, at ta› ikki er so attraktivt at sleppa at sigla vi› Ternuni I, tí skipi› er gamalt og líti› áhugavert.

Sjálvur er Sámal Petur útbúgvin skipari. Hann fór á skúla í 1993 og var li›ugur í 1994. Kortini fór hann ikki út at sigla tá, tí sum kunnugt gjørdist hann landsst‡risma›ur ta› ári›.

– Tí havi eg ikki siglt sí›ani 1993, og tí má eg út at sigla fyri at var›veita pappírini, sigur Sámal Petur og leggur afturat, at pappírini skulu haldast í ordan.

– Men ta› skal ikki misskiljast, tí eg havi mangan havt hug at fara út aftur at sigla sí›ani eg fekk pappírini, sigur hann.

Vánalig forrætning

Sum kunnugt var Sámal Petur ein av teimum tingmonnum, sum í síni tí› leg›i fram uppskoti› um at taka siglingina millum Skálafjør›in og Havnina uppaftur.

Hann duldi onganatí› fyri, at hann sjálvur var ein teirra, sum sakna›i sjóvegis farlei›ina og ta› tí›ina siglingin var í gongd var hann ein teirra, sum brúkti hana nógv.

Er ta› tí ikki ein vánaligur handil hjá Strandfer›sluni, at seta teg sum st‡rimann á Ternuni I?

– Hvussu meinar tú?

Eg meini so vi›, at tú hevur veri› ein av teimum trúgvu fer›afólkunum. Tá teir seta teg, sum st‡rimann, so missa teir eitt fer›afólk burtur av grundarlagnum. Og uppaftur verri, teir skulu framyvir gjalda tær løn fyri at sigla vi› ...

– Ta› kanst tú gott siga, sigur Sámal Petur og bestur út úr at flenna.

Hann fótar sær tó skjótt aftur og tekur aftur í aftur ta› »líti› áhugaverda« vi› at sigla vi› Ternuni I.

– Ta› skal skiljast solei›is, at fyrsti túrur er av Strondum, og ta› merkir, at ta› er óhøgligt hjá teimum, sum búgva í Havn. Teir mugu koyra inn higar. Harafturat liggur skipi› seks tímar á Havnini, og tá eru vit útskei›a›ir, grei›ir Sámal Petur frá.



Sámal Petur í Grund st‡rima›ur umbor› á Ternuni I

Hálvur st‡rima›ur

Men ta› er kanska júst her, at »hitt« starvi› hjá Sámal Peturi kemur inn í myndina. Sámal Petur er sum kunnugt tingma›ur og teirra arbei›spláss er í Havn.

– Í fyrsta umfari er hetta me›an vit hava summarfrí frá tinginum, men er ta› so heppi›, at eg fái hetta at passa saman vi› tingarbei›i, so er ikki óhugsandi, at eg fari› at halda fast vi› ta›, sigur hann.

Men ta› er okkurt vi› hægri tingmannalønum og ø›rum størvum?

– Jú, jú. Vit hava ikki loyvi› til at hava fult starv afturat tingstarvinum og tær treytirnar skal eg eisini ganga undir, sigur hann.

– Tí er ta› ikki óhugsandi, at eg fari at gera alt fyri at fáa ta› sum eitt hálvt starv, um so er, at ta› er samsvar millum tingmannastarvi› og st‡rimansstarvi›, sigur Sámal Petur í Grund, sum gle›ir seg at sleppa til arbei›is – á sjónum – mánamorgunin.

Men ta› er nú beista tí›liga, kortini ...

Gongd skal á aftur Atlantis

Klaksvíkar B‡rá› vi›gjørdi á b‡rá›sfundi í gjárkvøldi› mentanarhúsi› Atlantis, sum hevur ligi› meira ella minni stilt í eina tí›. Umbo› fyri fer›avinnuna í Klaksvík siga, at hesum hava tey bí›a› eftir, sí›an húsi› lat aftur

STEFAN Í SKORINI

Klaksvíkar B‡rá› vil fegi› hava, at anna› virksemi enn bert sjónleikur aftur ver›ur at síggja og hoyra í Atlantis. Stø›an er í løtuni tann, at bert sjónleikavirksemi hevur veri› í húsinum, men nú skal vend koma í. B‡rá›i› hevur lati› tilsamans 450.000 kr. til Atlantis, men ætlanin er er nú at seta meira pening í húsi›. Atlantis var› umvælt fyri eini 3 mió. kr. fyri fáum árum sí›ani, og henda kostna›armikla umvæling var eisini orsøkin til, at húsi› lat aftur.

Ta› var› sligi› ógvuliga stórt upp, tá i› Atlantis lat upp, og at byrja vi› var hetta tiltaki› sera væl eydna›, men tíverri fyri nor›oyingar datt hetta ni›urfyri aftur. Fíggjarligir trupulleikar í sambandi vi› umvælingina vóru orsøkirnar til, at húsi› lat aftur. Umvælingarnar gjørdust ov d‡rar, og tí var› avger› tikin um, at gevast í eina tí›.

Mentanarnevndin sær trupulleikan

Mentanarnevndin í Klaksvíkar B‡rá›i leg›i á fundi í gjárkvøldi eina framtí›arætlan vi›víkjandi Atlantis fram. Endamáli› vi› ætlanini er, at Atlantis aftur gerst ein mi›depil í Klaksvíkini. Ætlanin er at seta eina nevnd, sum sí›ani skal seta ein lei›ara. Hesin lei›ari skal hava ábyrgdina av tí dagliga virkseminum í Atlantis. Eisini skal ein rakstrarætlan fyri húsi› leggjast fram, sum skal ver›a positiv. Í hesum liggur ikki, at peningaligur vinningur skal fáast av virkseminum, men at b‡rá›i› eisini leggur pening í húsi›, sum skal tryggja mentanarhúsinum framhaldandi møguleikar at ver›a virki›. Sjónleikarafelagi› skal framhaldandi vera í húsinum, men filmir skulu eisini ver›a vístir í Atlantis. Hvussu húsi› skal virka í sambandi vi› fer›avinnuna ver›ur upp til lei›aran, sum fær ábyrgdina av virkseminum.

Øki›, sum húsi› stendur á, er serliga ætla› til mentanarvirksemi í Klaksvíkini, men tíverri hava klaksvíkingar ikki sæ› stórvegis til slíkt seinastu tí›ina.

Ongantí› ov tí›liga

Emma Heinesen, sum er lei›ari av Kunningarstovuni í Klaksvík, sigur, at ta› er ongantí› ov tí›liga, at gongd kemur á aftur virksemi í Atlantis. Hon vísir eisini á, at ta› er alney›ugt vi› einum dagligum lei›ara av Atlantis. Hesin skal so hava evstu ábyrgd av tí, sum fer fram í húsinum, og ta› er eisini ta›, i› B‡rá›i› hevur ætlanir um.

Í løtuni er ein sera stórur tørvur á at fáa ein biograf aftur í Klaksvík. Á Kunningarstovuni fáa tey hvørja viku fyrispurningar um, nær biografurin aftur ver›ur opin. Í løtuni er ta› so, at ungdómar fara til mi›sta›arøki í biograf, og ta› er sera óheppi› heldur Emma Heinesen, tá i› eitt sera gott høli longu er á sta›num.

– Vónandi kemur okkurt ítøkiligt burturúr ætlanunum hjá b‡rá›num hesafer›. Atlantis hevur veri› vi›gjørt fyrr, men einki er komi› burturúr, leggur Emma Heinesen afturat.

Eisini gott fyri fer›avinnuna

Fer›avinnan í Nor›oyggjum kastar sum er ikki tær stóru upphæddirnar av sær, men hóast ta› so er avgjørt ney›ugt vi› einum slíkum mi›depli, sum kann ver›a karmur um tiltøk, i› serliga eru ætla› fer›afólki. Emma Heinesen heldur, at ta› er vánaligt, at tann næststørsti b‡urin í Føroyum ikki hevur naka› at bjó›a fer›afólki, sum leggja lei›ina hagar.

Um ætlaninar hjá b‡rá›num ver›a settar í verk ver›ur ney›ugt hjá b‡rá›num at syrgja fyri, at virksemi› ikki dettur ni›urfyri aftur.

Líkt er til at gongd kemur aftur á arbei›i› í Atlantis

gult cyan magenta svart